# Ein heimur fyri seg

S p/f Mykines er ferðavinnufelag sett á stovn í mai 2006, og eru tað vágamennirnar Ellef Ellefsen og Tummas Henriksen, ið vóru stovnarar. Felagið er virkið í ferðavinnuni frá 1. mai til 31. august. Í 2006 fekk S p/f Mykines rættindini frá Strandfaraskipum Landsins, at røkja Mykinesleiðina. Til hesa uppgávu, hevur felagið keypt bátin Brynhild, av slagnum Seiga 1210. Báturin tekur 40 ferðafólk og gongur 22 míl. Tá veðrir loyvir tí, er siglingartíðin einans 40 minuttir, í mun til tá Strandfaraskip Landsins róku leiðina við bátinum Súlan. Tá vardi túrurin á leið 1t 30 minuttir. Komin til Mykinesar, er tað møguleiki at leiga bátin ein túr út á Tindhólm, og eru hesi bæði plássini av føroya náttúruvakrastu plássum. Fleiri og fleiri fyritøkur velja at gera útferðir út til Mykinesar og út á hólmin, og er tað eisini absolut vert at uppliva.






















